# VEL VIT OG SKIL

## FRAMSÓKN LIBERALI TJÓÐSKAPARFLOKKURIN

### VEL VIT OG SKIL

Tað gongur væl í Føroyum. Vit eru eitt av heimsins ríkastu londum, har stóri bulurin av fólkinum hevur tað gott og arbeiði er til allar hendur. Samfelagið er ment og útbygt á stórt sæð øllum økjum og almenna skuldin er enn lág – og tó - hóast hesar góðu fortreytir, liggur ein óloyst haldførisavbjóðing fyri framman, har útreiðslurnar renna undan inntøkunum. Neyðug tøk skulu takast fyri at fáa javnvág í. Tað krevur dirvi og støðufesti, men tað letur seg væl gera.

- Nýskipanir skulu fremjast, so meiri fæst fyri hvørja krónu.
- Dupultfunktiónir skulu skerast burtur og almennar uppgávur skulu røkjast í størri eindum.
- Fíggjarpolitiskt regluverk skal setast í verk.
- Sett verður eitt hámark fyri setan av almennum fyrisitingarligum størvum.
- Pensjónsskipanin skal tillagast og gerast meiri smidlig, so hon loftar broyttu fólkasamansetingini og tørvinum hjá tí einstaka.
- Nýggir skattir og avgjøld verða ikki sett í verk. Verandi landskassainntøkur skulu hinvegin gagnnýtast munandi betur.
- Ein veruleikakend langtíðar íløguætlan skal gerast.
- Tálmandi fíggjarpolitikkurin heldur fram.

### FYRI KOMANDI ÆTTARLIÐ

Fólkavøkstur betrar um haldføri. Vit skulu skapa góð alternativ tilboð til ung, sum umhugsa at flyta av landinum. Tað skal vera ein fyrimunur hjá føroyingum at flyta heim aftur, og tað skal vera lætt at stovna familju.

- Útboðið av útbúgvingum skal víðkast – serliga vinnuvendar útbúgvingar og yrkisútbúgingar.
- Lesandi í Føroyum fáa líknandi skattafyrimunir, sum lesandi føroyingar fáa í Danmark.
- Føroyingar sum flyta heim eftir loknan lesnað fáa tíðaravmarkaðan skattalætta.
- Hámarkið fyri barsilsútgjaldið úr 32.000 kr. upp í 40.000 kr, og skipanin verður gjørd smidligari.

### NÓGV FLEIRI BÚSTAÐIR

Størsta avbjóðingin í Føroyska samfelagnum er bústaðartrotið. Skeiklaði bústaðarmarknaðurin er ein fløskuhálsur fyri tilflyting og vøkstur. Fyrst er at viðurkenna at avbjóðingin er samansett, men at tað í størstan mun snýr seg um at fáa útboðið at svara til stóra eftirspurningin.

- Miðvíst samstarv millum vinnu, kommunur og land skal fremja skjóta bústaðarbygging við prísum, har tey flestu kunnu vera við.
- Alt regluverk, ið fevnir um bygging, skal gerast smidligari – frá matrikulering til byggiloyvi og byggikunngerð.
- Vit innføra eina viðgerðartrygd fyri byggiloyvi innan ávísa freist.
- Felagið Bústaðir skal næstu árini byggja ungdóms- og eldrabústaðir burturav.
- Ein løggilding av handverksmeistarum verður sett í verk.
- Rentustuðulin skal niðurlagast yvir eitt longri áramál.

### VIT SKULU VAKSA UM BÚSKAPIN

Góðir vinnukarmar skunda undir búskaparvøkstur og stimbra íverksetan og arbeiðsútboð.

- Vaksandi skattatrýstið skal steðga – mørkini í inntøkuskattinum skulu javnast.
- Óneyðugar og dýrkandi reglur verða avtiknar.
- Tilmælini í Vakstrarforum verða framhaldandi sett í verk.
- Fokus eigur at verða sett á at stimbra nýggjar vinnuvegir, sum KT, ferðavinnu, shipping, grøna orkaskiftið og rúmdarvinnu.
- Skundast skal undir at troyta føroyskt náttúrutilfeingi, so sum olju, gass og sjáldsom mineralir á havbotninum.
- Ein heildarætlan verður gjørd fyri vitlíki.
- Vit skulu skunda undir grøna orkuframleiðslu – tað skal gerast lættari hjá privatum at framleiða inn á orkukervið hjá SEV.

## TJÓÐARSEMJAN

Føroyar skulu verða sjálvstøðug tjóð, í einum nýggjum samstarvi við Danmark. Framsókn tekur undir við millumflokka tjóðarsemjuni, og arbeiðast skal víðari út frá henni.

- Rættarskipanin skal yvirtakast.
- Føroyar skal arbeiða fyri at fáa fleiri handilsavtalur – limaskapur í EFTA skal roynast.
- Føroyar skulu hava størri ábyrgd av verju- og trygdarpolitikki, í tøttum samstarvi við Danmark og NATO.
- Hetta verður seinasta fólkatingsval – eftir komandi setu verða føroysku fólkatingssessirnir avtiknir.

## ARBEIÐSMARKNAÐURIN OG ÚTLENDINGAR

Útlendingar geva eitt neyðugt og jaligt íkast til okkara búskap, mentan og samfelag. Uttan hesi fólk, var nógv virksemi munandi skert í Føroyum. Men vit skulu ikki vera bangin fyri at seta treytir, tí Føroyar, okkara mál og mentan eru viðbreknar.

- Neyvt eftirlit skal vera við útlendingum sum flyta til Føroya, herundir krav um revsiváttan.
- Útlendingar við arbeiðs- og uppihaldsloyvi fáa ikki rætt til samfylgjandi familju fyrr enn 3 ár eru liðin.
- Krav um málførleikar verða settir, tá umsøkjari av arbeiðs- og uppihaldsloyvi søkir fyri 3. ferð.
- Leypandi skattalættar skulu stimbra føroyska arbeiðsútboðið.
- Mótrokningarmarkið í fólkapensjónini skal javnast svarandi til lønarvøksturin.

